## Nýtt í Marilyn Monroe-málinum

Eitt hitt mest umrødda deyðsfallið er tað av Marilyn Monroe í 1962. Og nú er ein nýggjur dokumentarfilmur á veg, ein filmur, sum sambært framleiðaranum kveikir nýtt ljós á hetta kenda deyðsfall. Tað er Keya Morgan, ið hevur gjørt samrøðu við ein FBI-agent, sum eygleiddi og avlurtaði íbúðina hjá Monroe tað kvøldið, hon andaðist. Almenna deyðsorsøkin var søgd at vera sjálvmorð, men nógvar samansvørjingarteoriir hava verið frammi, teoriir, sum millum annað umfata bæði John og Robert Kennedy.



## Prestur selur marihuana

Tað skal valdast prestar. CraigX Rubin er júst dømdur fyri at selja marihuana í kirkju síni í Hollywood. Millum kundarnar sigst vera ein so navnframur maður sum Brad Pitt. Sektin nevnist Temple 420 (úttalað four-twenty) og er ímyndin av marihuana. Hetta kemst eftir øllum at døma av, at nakrir High School-næmingar í San Rafael í 1971 hittust hvønn dag klokkan 4.20 at roykja marihuana framman fyri eini standmynd av Louis Pasteur. Revsingin verður ásett 17. August, og presturin kann rokna við upp til átta mánaðir handan rimar.

# Tjóðarlundir til fólkið

**Føroyar eru ótrúliga náttúruvakrar, og tí áttu vit at skapt nakrar tjóðarlundir, so vit kundu varðveitt okkara ríka plantu- og urtalív, fyri ikki at tala um fuglalív, sigur Heidi Petersen**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í framløgu síni í sambandi við viðgerðina av løgmansrøðuni, nam Heidi Petersen við føroysku náttúruna og vísti á, hvussu ótrúliga vøkur hon er.

- Okkara náttúra er serstakliga vøkur, men samstundis eisini ógvuliga sárbar. Hon verður nýtt í ein stóran mun til húsdjórahald, har bæði seyður, neyt og gæs verða slept og ganga í haganum. Hetta gongur út yvir plantir og urtir eins væl og fuglalív, og tí áttu vit at skipa nøkur av okkara allarvakrastu og mest týðandi økjum sum tjóðarlundir, har einki órógvandi slapp framat, sigur Heidi Petersen.

Hon sigur, at økir áttu at verið skapt, har eingi djór og ongar maskinur av nøkrum slag sluppu framat, hvørki bilar ella bátar. Einki, sum kann órógva hvørki plantir og urtir ella fuglin. Heidi Petersen vísir á nøkur ítøkilig øki, sum eru serliga rík við antin plantum og urtum ella fugli.

- Sum dømi kundi verið nevnt Gróthúsvatn á Sandoynni, sum er kent fyri sítt ríka plantu- og urtalív. Har finnast plantusløg, sum helst ikki finnast aðrastaðni í Føroyum. Og Toftavatn, sum er kent fyri sítt ríka fuglalív. Ella Eiðiskollur, sum bæði hevur ríkt plantu- og fuglslív. Og tað eru eitt ótal av øðrum møguleikum eisini, sigur Heidi Petersen.

Onnur serlig eyðkenni kundu eisini komið upp á tal, eitt nú fossar, áðir og serligir hamrar. Støð, sum skulu skipast á slíkan hátt, at bert ber til at koma hagar hjá fólki til gongu.

- Nú so nógv verður tosað um náttúru og umhvørvi haldi eg, at hetta er júst rætta tíðin at taka hetta málið upp, sigur Heidi Petersen.



*Heidi Petersen mælir til at seta á stovn tjóðarlundir kring landið*

# Spennandi útlit



*enis av Rana heldur útmeldingina hjá nýggja formanninum í Fólkaflokkinum vera spannandi*

**Jenis av Rana dámar væl úttalilsini frá nýggja Fólkafloksformanninum, tí hann nemur við mál, sum standa Miðflokkinum nær**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Formaður Miðfloksins hevur serliga heft seg við fráboðanina hjá nýggja formanninum í Fólkaflokkinum, Jørgen Niclasen, um, at hann ætlar at profilera sosialliberala politikkin munandi kraftigari enn flokkurin hevur gjørt higartil.

- Vit fegnast um hesa útmeldingina, tí sosialpolitikkurin er júst nakað, sum vit í Miðflokkinum raðfesta ógvuliga høgt. Og hetta var eisini júst tað, eg sóknaðist eftir í mínari framløguræðu, sigur Jenis av Rana.

Hann væntar eina ávísa broyting, nú Jørgen Niclasen er vorðin formaður í Fólkaflokkinum.

- Aldurin í sjálvum sær er ein broyting. Og talan verður sjálvsagt um eina broyting, men eina positiva broyting, tí við útmeldingini um at leggja størri dent á sosialpolitikkin og samstundis at taka størri stig á sjálvbjargnisleið, so er tað nakað, sum vit taka undir við, sigur Jenis av Rana.

Formaður Miðfloksins tulkar útmeldingina hjá Jørgen Niclasen so, at flokkurin nú er til reiðar at hugsa meiri um tey veiku í samfelagnum, og harvið at leggja á annan bógv.

- Vit hava altíð havt eitt gott samstarv við Anfinn Kalsberg, og við nýggja leiðaranum hava vit enn meiri at samstarva um á sosiala og sjálvstýrisøkinum, sigur Jenis av Rana.

# Ungur men royndur

**Anfinn Kalsberg hevur altíð verið ógvuliga siðiligur og ógvuliga dugnaligur. Og tá hann legði frá sær, hevði flokkurin í veruleikanum ein »luksus-trupulleika«, sigur løgmaður um formansskiftið í Fólkaflokkinum**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, hevur í nógv ár havt samstarv við Fólkaflokkin, og longu í samgongusamráðingunum í 1991 kom hann at kenna Anfinn Kalsberg á politiska frontinum.

- Tá var Jógvan Sundstein formaður, men Anfinn Kalsberg var sum næstformaður við í samráðingunum, og tað, sum altíð hevur eyðkent Anfinn Kalsberg er, at hann er ógvuliga siðiligur, og dugir sítt handverk ótrúliga væl, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður og formaður í Javnaðarflokkinum.

Løgmaður er ikki í iva um, at Jørgen Niclasen fer at megna uppgávuna sum floksformaður væl.

- Hann hevur longu fungerað sum formaður, og hann er eisini partur av »lítlu samgongu«, og hann hevur góð evni at finna semjur, og er lættur í sínum máta at vera upp á. So eg vænti avgjørt ongar trupulleikar at samstarva við hann, sigur løgmaður.

- Sjálvandi hava teir hvør sín stíl. Meðan Anfinn hevur verið tungur í sessinum, er Jørgen meiri kvikur, sigur løgmaður.

Hann ger tó vart við, at hann sanniliga eisini hevur havt eitt gott samstarv við hin kandidatin til formanssessin, Bjarna Djurholm. So uttan mun til, hvør av teimum gjørdist nýggjur formaður í Fólkaflokkinum, var løgmaður vísur í góðum samstarvsmøguleikum.

- Eg fari so at ynskja Jørgen góða eydnu í starvinum. Tað verður ikki lætt. Fremsta málið hjá honum verður at halda saman upp á flokkin. Annars merkir formansskiftið í Fólkaflokkinum, at eg nú eri elsti floksformaður, og tað gevur mær nakað at hugsa um, sigur løgmaður við einum »undirfundigum« eygnabrá.



*Løgmaður heldur, at Fólkaflokkurin hevði ein luksus trupulleika, tá hann skuldi velja nýggjan formann.*